## Forelskaður sjónleikari í Århus

**Leygarkvøldið 2. oktober verða Forelskaður sjónleikari og allir hinir fittu og fúlu sangirnir at hoyra í Århus**

TÍÐINDASKRIV
*Føroyingafelagið í Århus*

Leygarkvøldið 2. oktober verður tann árliga pisuveitslan fyriskipað í Århus. Tað er Føroyingafelagið í býnum sum á hvørjum ári heldur hesa veitslu. Veitslan er ætlað sum eitt tiltak fyri at bjóða nýggjum fólki vælkomnum til býin og hjá yngri og eldri føroyingum í Århus at hittast. Men í ár verður nakað serligt gjørt burturúr. Tað hevur eydnast føroyingafelagnum at fáa Finn Jen-sen, forsangara í Páll Finnur Páll, at koma til Århus at spæla. Leygarkvøldið 2. oktober fer hann at spæla saman við Ronni Poulsen og Jóan Petur á Stongunum. Teir koma allir tríggir úr Føroyum til Danmarkar í hesum ørindunum. Teir tríggir hava drúgvar royndir at spæla saman ymstaðni í Føroyum, men hetta er fyrstu ferð, at Forelskaður sjónleikari og hinir sangirnir eru at hoyra uttan fyri Føroyar.

– Vit ætla okkum at spæla Páll Finnur Páll tilfar - fitt sum fúlt - og so nøkur góð løg afturat, sigur Finnur Jensen.

Hølini hjá føroyingunum í næststørsta danska býnum eru ikki tey størstu, og tískil er avmarkað, hvussu nógv fólk sleppa inn. Atgongumerki fáast til keyps í hølunum hjá føroyingafelagnum. Fyri limir og pisur er kostnaðurin 100 krónur fyri borðhald og tónleik aftaná. Atgongumerki bert til tónleikin kunnu keypast við dyrnar eftir borðhaldið.

Føroyingafelagið í Århus heldur til í Vestergade 48d. Heimasíða: www.aarstova.dk

Stuðlað tiltakinum hava Atlantic Airways og Føroya Sparikassi.

# Stovnurin eitur Eikilund

**Barnaansingarstovnurin í Vági eitur Eikilund. Hetta varð avdúkað á lítlari samkomu týsdagin. 34 uppskot komu inn í navnakappingini og nummar eitt, tvey og trý fingu heiðursgávu**

NØVN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Barnaansingarstovnurin í Vági hevur virkað í umleið eitt ár. Har er vøggustova og barnagarður. Men navn hevði stovnurin ikki og tí varð skipað fyri lítlari hugskotskapping. Týsdagin varð lítil samkoma, har Ásgerð Stenberg frá mentanarnevndini í Vágs Býráð avdúkaðu navnið á stovninum.

Hon fegnaðist um, at ummælini, ið stovnurin fær eftir eitt ára virksemi, eru sera góð. Hon segði, at 34 uppskot komu inn, so áhugin var stórur, og fleiri vøkur nøvn vóru at velja í. Men semja var í býráðnum um at nevna stovnin Eikilund.

Og síðani endurgav hon úr yrkingini hjá H.A. Djurhuus: Drívur døgg um døkka grund, dimmist millum fanna, omanfyri eikilund, hongur silvurkanna.

Uppskotini, sum gjørdust nummar tvey og trý vóru ávikavist Várspógvin og Sóldøgg.

Vegna mentanarnevndina takkaði Ásgerð Stenberg fyri gott samstarv og síðani avdúkaði hon eisini, at heiðursgávur vóru til vinnandi hugskotini. Vinnandi hugskotið átti Dagfinn Olsen og nummar tvey og trý



*Ásgerð Stenberg, býráðslimur, avdúkaði vegna mentanarnevninda navnið á barnaansingarstovninum í Vági*

átti Ásgerð Ásgerðdóttir (Aggi). Tey fingu prýðiliga vatnkaraflu við silvuri á, har graverað var í, hvat gávan var latin fyri.

Børnini sungu nakrar sangir og so fingu øll ein drekkamunn, við kaku og kaffi. Ein grøn slangukøka til børnini og ein lagkøka við áskriftini Eikilund til tey vaksnu.

Sostatt ganga børnini í barnaansingarstovninum í Vági ikki bert í barnagarð ella í vøggustovu, tey ganga nú í Eikilund, sum snotuliga navnaskeltið á stovninum eisini boðar frá. Skeltið hava starvsfólk á varda verkstaðnum á Bakka evnað til.



*Børnini í Eikilund sungu so lystiliga*

# Grøðingar- & prædikumaður vitjar í Føroyum

**Danski prædikumaðurin Hans Berntsen og konan Inge vitja í Føroyum 27. - 29. september**

VITJAN
*Tíðindaskriv*

Í komandi viku verða Hans & Inge Berntsen í Føroyum, har tey fara at tosa - og biðja fyri sjúkum. Hesuferð verða tey í Suðuroynni og í Eysturoynni.

Fyrsta tiltakið verður mánakvøldið 27. september kl. 20.00 í Stóra Pakkhúsi í Vági. Týskvøldið 28. september kl. 20.00 verða Hans og Inge í Skúlahøllini í Trongisvági. Og mikukvøldið 29. september í nýggja bygninginum hjá Kelduni í Skálabotni kl. 20.00.

Hans & Inge Berntsen ferðast regluliga kring Danmark, og bæði har og uttanlanda síggja tey fólk verða grødd og stór undur henda. Seinasta árið hava tey eisini verið við at hjálpt og stuðlað í Ukraina, har tey hava biðið fyri sjúklingum og stuðlað við at fíggja nýggja útgerð til eitt sjúkrahús. Og á ferð í Filipsoyggjunum eru tey komin í samband við eina av minstu samkomunum í verðini, og ætla at gera túr aftur hagar fyrst í komandi ári.

Hans & Inge vóru í Føroyum í juli mánaði seinasta ár, har tey vitjaðu í Havn og á Glyvrum, og nógv fólk løgdu leiðina framvið fyri at lurta og ikki minst at síggja. Stílurin hjá Hans & Inge er sum altíð, ógvuliga lættur og óformellur.

Hevur tú hug at uppliva Hans Berntsen hesar dagarnar, so ert tú vælkomin til eitt ella fleiri av tiltøkunum. Hans Berntsen leggur stóran dent á at kunna biðja persónliga fyri fólki, so eisini hesuferð verður møguleiki fyri persónligari forbøn fyri teimum, sum ynskja tað.

Fyri tiltøkunum stendur Café One Way á Tvøroyri, og um onkur ynskir at koma í samband við tey bæði, ber til at ringja á tlf. 22 26 94.

**Skrá fyri tiltøkini:**

Mánadagin 27. september
kl. 20.00 í Stóra Pakkhúsi í Vági
Týsdagin 28. september
kl. 20.00 í Skúlahøllini í Trongisvági
Mikudagin 29. september
kl. 20.00 í Kelduni í Skálabotni



Nýggjur handil í Havn:

# Danskt design og Miss Sixty

**Nýggi klædnahandilin Preeti Payal lat seinasta leygardag upp í miðbýnum í Havn. Tað eru systrarnar Jutta Helgadóttir og Sarina Augustinussen, ið hava handilin**

NÝGGJUR HANDIL
*Eydna Skaale*
*eydna@sosialurin.fo*



*Jutta Helgadóttir, sum saman við systrini Sarinu Augustinussen eigur handilin Preeti Payal, sæst her í buksum frá Miss Sixty og einum av øðrvísi jakkunum frá Ducal Design*

*Mynd: Jens Kr.Vang*

Fyri tveimum árum síðani lótu systrarnar Jutta og Sarina upp ein handil við klæðum og brúkstingum í Vági. Tað hevur gingið sum eftir ánni, og tí gjørdu tær av, eisini at royna seg í Havn.

– Vit hava eitt danskt designmerki, nevnt Ducal Design, sum vit eru einaumboð fyri í Føroyum. Eisini selja vit kenda merkið Miss Sixty, sum ein handil í Runavík eisini selur. At enda hava vit eisini nøkur fá indisk brúksting, so sum stakar, krukkur og tílíkt, sigur Jutta Helgadóttir frá.

### Ducal Design

Miss Sixty er eitt somikið kent merki, at tað neyvan nýtist at fáa nakra størri presentatión.

Øðrvísi er við merkinum Ducal Design, sum ikki er serliga vælkent her heima.

– Ducal Design byrjaði við, at hon, sum stendur aftanfyri merkið, byrjaði at gera og selja taskur. Tær gingu sum heitt breyð, og tí fór hon eisini undir at designa klædnavørur. Í dag hevur hon eitt stórt virki undir sær og 17 seymikonur. Klæðini hjá henni verða seld til 40 ymiskar handlar. Men hóast tað, verða pløggini ikki hópframleidd, greiðir Jutta frá.

Hon sigur víðari, at meðan klæðini enn eru á tekniborðinum, verður avgjørt hvussu nógv eintøk skulu gerast.

– Hon bestemmar seg til dømis fyri at gera 100 jakkar av einum ávísum modellið. Síðani verða teir hundrað jakkarnir býttir ímillum 40 handlar, so tað sigur seg sjálvt, at møguleikin at møta onkrum í einum jakka av sama slagi er rættiliga lítil, sigur Jutta.

Tá hon bíleggur, plagar hon at biðja um eitt eintak í hvørjari støðd. So hon fær ongantíð meiri enn eini fýra pløgg, sum eru eins.

Klæðini frá Ducal Design eru mest í jørðlitum, brúnt, beige og myrkagrønt, við stuttligum og spennandi detaljum. Tú fært bæði buksur, niðurdeilar, blusur, troyggjur og jakkar av merkinum.

– Eitt, sum kanska er kennimerkið er, at hon nýtir ymiskt forkunnugt til detaljurnar. Bæði kanin- og kópaskinn, rugskin av hjørti, knarvar av horni og beini og eisini ymiskt bundið. Tað ger tað spennandi og øðrvísið, greiðir Jutta frá.

Serligi stílurin gongur eisini aftur ígjøgnum allar kollektiónirnar, so pløggini kunnu nýtast saman, óansæð um tað gongur long tíð ímillum keypini.

– Tey leggja dent á, at tú ikki skalt noyðast at skifta alla garderobuna út, hvørjaferð ein nýggj kollektión kemur. Tá kanst tú bara keypa tær okkurt einkult plagg afturat, tí tað er alt designað í sama stíli, sigur Jutta.

### Preeti Payal

– Handilin í Havn eitur eftir handlinum í Vági. Tað er kanska eitt óvanligt navn, men tað er ikki tilvildarligt, at handlarnir eita júst soleiðis, greiðir Jutta frá.

Hon sigur, at eftirsum tær fóru undir at selja indisk ting, vildu tær hava eitt indiskt navn til handilin. Tær kenna tvær indiskar systrar har suðuri frá, onnur eitur Preeti og hin eitur Payal. Og tí bleiv navnið á handlinum Preeti Payal.

Jutta og Sarina hava ikki gjørt so nógv við hølini í Havn, síðani tær fluttu inn við Preeti Payal, men hava hildið gamla, hugnaliga stílin.

Handilin er í Niels Finsensgøtu, har sum hattahandilin hjá Minnu fyrr plagdi at vera.

Jutta sigur, at tað longu hava verið nógv fólk inni á gólvinum.

– Tað er altíð stuttligt at lata ein handil upp, tí tað kemur altíð so nógv fólk inn at forvitnast. Høvdu tey bara blivið við at komið aftur, so hevði tað verið deiligt, sigur hon flennandi. Alla ta fyrstu vikuna hevur Preeti Payal havt nøkur upplatingartilboð, sum vera galdandi til og við leygardagin.

# Fokus á Europa á javnaðarstevnu

LANDSSTEVNA
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Tað vera ikki einans heimligir spurningar, sum fara at verða viðgjørdir á landsfundinum hjá Javnaðarflokkinum hetta vikuskiftið. Fokus verður eisini sett á Europa og tað europeiska samarbeiði og her ikki minst á EU. Í hesum sambandi er formaðurin í Europanevndini hjá Fólkatinginum, Claus Larsen-Jensen komin til Føroya at halda fyrilestur.

Claus Larsen-Jensen sigur við Sosialin, at hann fer at tosa um Europa í dag og í framtíðini. Hann vísir á, at uttan mun til um lond eru limir í EU ella ikki, so fer útviklingurin í EU at hava stóra ávirkan á framtíðar útviklingin í øllum londunum, og tí eru allir evropearar noyddir til at fyrihalda seg til gongdina innan EU so ella so.

– Eg eri fegin at vera boðin til Føroya at tosa um øll hesi viðurskiftini, og fari eg tí eisini at geva eina mynd av, hvar fer at henda í tí nýggja Europa. Frá at vera ein felagsskapur, sum mest hevur samstarvað um handilslig áhugamál, verður framtíðar EU meira ein politiskur felagsskapur. Claus Larsen-Jensen sigur víðari, at tað er ein sannroynd, at tað tjóðskaparliga telur meira og meira í nógvum av londunum, og tí verður tað uppgávan hjá EU at sameina tað tjóðskaparliga við felags áhugamálini hjá øllum londunum. Claus Larsen-Jensen fer so eisini at viðgera Norrøna samstarvið, hvønn týdning tað hevur sæð í EU-høpi. Hann fer eisini at nema við, hvussu verður við viðurskiftunum millum Danmark og Føroyar í framtíðar Europa. Eisini fer hann longur út í heim og fer at seta Europa í relatión til restina av heiminum.

Claus Larsen-Jensen fer at vera við á øllum landsfundinum hjá Javnaðarflokkinum, sum verður í Lærarskúlahøllini fríggjakvøld og leygardag.



*Claus Larsen-Jensen, fólkatingsmaður og formaður í Europanevndini hjá fólkatinginum kom til Føroyar í gjár saman við konuni. Hetta er fyrsta vitjan teirra her og hittu tey nakrar av tingmonnum javnaðarfloksins og løgmanni uttan fyri Hafnia í gjár*

*Mynd Jan Müller*